# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk



Øllum tykkum, ið á ymiskan hátt mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 11. januar 2008, takka vit hjartaliga.

**Kærar heilsur**
**Daisy og Ásbjørn**

## Til minnis um Torleif



Formaðurin í Klaksvíkar Ítróttarfelag, Torleif Sigurðsson, andaðist tann 12. februar, 61 ára gamal.

Tað kom sum ein skelkur fyri okkum øll í Klaksvíkar Ítróttarfelag, at Torleif nú andaðist bert 61 ára gamal.

Sum formaður í Fótbóltssambandinum í meira enn 20 ár var hann maðurin, sum vann føroyskum fótbólti altjóða viðurkenning.

Hósdagin 2. mars 2006 varð hann valdur til formann í Klaksvíkar Ítróttarfelag, og hevur hann síðani verið savnandi ímyndin av felagnum.

Hansara fremsta mál sum formaður var at skapa felagnum tryggar karmar at virka undir og harvið tryggja felagnum ein sunnan og góðan gróður, sum hann sjálvur plagdi at málbera seg.

Stóran týdning legði hann í, at karmarnir kring ítróttina í Norðoyggjum vórðu mentir, og seinastu dagarnar arbeiddi hann við framtíðarætlanum fyri Klaksvíkar Ítróttarfelag, og var hetta arbeiði komið væl áleiðis.

Klaksvíkar Ítróttarfelag hevur samkenslu við konu Torleif, Elsu Mariu og børnunum Sofíu, Margrethu, Ernu og øllum sum varða av.

Sambært viðtøkum felagsins, røkir næstformaðurin, Nichels Lützen, skyldur formannsins fram til aðalfundin.

**Klaksvíkar Ítróttarfelag**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg og gjørdu 90 ára dagin ógloymandi, takki eg hjartaliga.

**Emma Winther**

# Spírandi list í Smiðjuni



*Aftara rað f.v.: Bjørg Niclasen, Marianna Vang Simonsen, Tomma Knudsen, Evald Joensen, Dagfinn S. Højgaard, Martia Christoffersen, Ada í Lið, Kristina Lervig og Jákup Lervig. Fremst f.v.: Randi M. Gunnarsdóttir, lærari, og Martina Eriksen. Hesi vanta á myndini: Hergerð Joensen, Signa Joensen og Jenny Joensen*

Fjórða ár á rað skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri framsýningini Spírandi list í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin læt upp fríggjadagin 15. februar og verður opin til og við 26. februar.

Allar dagar frá kl. 15-18.

## Nýggjur leiðari í Dávavirkinum



Frá mánadegnum 18. februar er Leivur Vitalis nýggjur leiðari í Dávavirkinum í Klaksvík er. Hann loysir Beintu Á. Gregersen av, nú hon fer í farloyvi.

Leivur er 23 ára gamal, úr Klaksvík og lesur til lærara á Føroya Læraraskúla. Hann hevur havt starv á Dávavirkinum síðan august 2007, tíggju tímar um vikuna. Hann hevur eisini verið sera virkin tónleikari á Dávavirkinum, síðani tað lat upp.

## Dagurin

19. februar. Ammon, deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu, sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.